# Vanja og Eyðbjørg vunnu ferðirnar til Jellingfestivalin

**Í samband við Prix Føroyar kappingina, skipaðu Prix Føroya og Sosialurin fyri kappingum, har tú t. d. kundi vinna ferðir til Jellingfestivalin, har føroyskir tónleikarar eisini spæla.**

**Føroysku vinnararnir fóru við flogfari til Danmarkar hósdagin**

PRIX VINNINGAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vanja Mikkelsen í Vági og Eyðbjørg Knudsen í Saltangará gjørdust hepnu vinnararnir í samband við kappingarnar, sum vóru í kjalarvørrinum av Prix Føroyar kappingini.

Tær vinna ferðir fyri tvey til Jellingfestivalin og tær eru farnar av landinum við flogfari hósdagin.

Vit hava frætt, at Vanja gjørdist ovurfegin, og hóast hon gongur á miðnámsskúla, har próvtøkurnar nú koma fyri, so gjørdi hon av at fara og bjóða vinkonuni Kristinu Augustinussen við.

### Føroyskir tónleikarar

Ein gularót hjá luttakandi tónleikarum til prixendabrestin – AME – er, at umboð fyri festivalar í útlondum velja sær umboð at spæla á festivalunum.

Føroysku umboðini á Jellingfestivalinum 27., 28. og 29. maj eru Teitur Lassen (fríggjadag), Guðrun Sólja Jacobsen og Eivør Pálsdóttir, báðar leygardag.

Onnur nøvn á festival-inum eru t.d. Zididada, Poul Krebs, Lars Lilholt, Savage Rose, Saybia, Kim Larsen, Scorpions, The Loft og mong onnur.

Starvslýsing www.runavik.fo




FØROYAPRENT - TEL. 314 555

Eitt starv sum byggifrøðingur á Teknisku Deild er leyst at søkja til setan 1. august 2005.

**Um Teknisku deild**
Tekniska deild umsitur øll teknisk mál sum sambart lóg eru áløgd kommununi. Deildin virkar harumframt sum umsiting hjá avvarandi nevndum.
Tekniska deild er ídag mannað við einum verkfrøðingi og einum byggifrøðingi.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við leiðaran av teknisku deild, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving, eftirliti og øðrum uppgávum sum deildin annars tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**
- Byggimálsviðgerð í samband við galdandi byggisamtykt/býarskipan
- Endurskoðan/víðkan av verandi byggisamtykt/býarskipan
- Fyrisiting av viðlíkahaldi av kommunalum bygningum
- Uppmátingar og avseting

**Vit leita eftir starvsfelaga ið**
- hevur útbúgving sum byggifrøðingur, helst við hollum royndum sum húsasmiður
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hollan kunleika til EDV, GIS, AutoCad
- hevur góð samskiftisevnir, bæði muntliga og skrivliga
- er opin og hevur lætt við at umgangast starvsfelagar og borgararnar í kommununi

**Vit bjóða tær**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi

**Setanarviðurskifti**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambart sáttmála millum Byggifrøðingafelagið og Føroya Landstýrið

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jógvan D. Jakobsen, býarverkfrøðing á telefon 417000

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsøkn í seinasta lagið 11.juni 2005

*Umsóknin skal sendast til:*

**Runavíkar kommunu**
Tekniska deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
Fo-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*

# Fimm tryggingartakarar veljast at umboða Lív

**Sum ein partur av tilgongdini at einskilja Føroya Lívstrygging verður skipað fyri einum umboðsráðslíknandi vali millum tryggingartakarnar, soleiðis at hesir fáa møguleika fyri at velja sær 5 umboð at taka sær av áhugamálum tryggingartakaranna undir einskiljingartilgongdini**

TRYGGING

Vinnumálaráðið hevur heitt á P/F Føroya Lívstrygging um at skipa fyri einum vali, har 5 persónar, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, verða valdir at umboða tryggingartakarnar í samband við at P/F Føroya Lívstrygging skal einskiljast.

Landsstýrið avgjørdi á landsstýrisfundi tann 17. november 2004 at einskilja P/F Føroya Lívstrygging

Í samband við fyrireikingar í Vinnumálaráðnum at selja Føroya Lívstrygging, samtykti Løgtingið í mars 2002 at heita á landsstýrið um at leggja uppskot fyri Løgtingið, soleiðis at P/F Føroya Lívstrygging varð skipað sum sjálveigandi stovnur ella á annan hátt, ið kann tryggja áhugamálini hjá øllum tryggingartakarunum um ávirkan og innlit.

Við atliti at løgtingssamtyktini hevur landsstýrið tí avgjørt at lata helvtina av partabrøvunum til felag, har allir tryggingartakarnir í Føroya Lívstrygging eru limir, og selja hina helvtina.

Sum ein partur av einskiljingartilgongdini verður tí skipað fyri einum umboðsráðslíknandi vali millum tryggingartakarnar, soleiðis at hesir fáa møguleika fyri at velja sær 5 umboð, at taka sær av áhugamálum tryggingartakaranna undir einskiljingar-tilgongdini.

Allir tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívs-trygging hava valrætt og kunnu stilla upp sum umboð og vera stillarar. Fyri at kunna stilla upp til valið krevst, at tann, ið ynskir at stilla upp, fær 15 stillarar.

Ein persónur kann bert vera stillari hjá einum valevni og einans eitt valevni kann vera á hvørjum uppstillingarlista. Fráboðan um uppstilling skal vera P/F Føroya Lívstrygging í hendi, í seinasta lagi 6. juni.

Tá ið Føroya Lívstrygging hevur fingið fráboðan frá tryggingartakarum, sum ynskja at stilla upp til val sum umboðsfólk, verður lýst í bløðunum, hvørji valevnini eru og tíðarfreistirnar fyri, nær atkvøðuseðil kann umbiðjast og nær hann skal vera skrivstovu felagsins í hendi.

